# Havt dekkini sum høvuðsmál í tríati ár

**Serverkstaður fyri hjól og dekk...**

DEKKFAMILJA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Ken Danielsen, Fríðrikur Bláhamar og Daniel Ólavur (Dani) Dahl-Olsen framman fyri SuperDekk við Hoyvíksvegin í Havn*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í hesum mánaðinum kunnu feðgarnir Fríðrikur og Sámal Bláhamar hátíðarhalda 30 ára dagin hjá fyritøku teirra, SuperDekk, sum í tríati ár hevur havt dekk sum skjaldrarmerki.

Søgan um Sámal Bláhamar og dekkini er tó eitt sindur eldri, tí hann byrjaði longu í januarmánaði í 1974 at selja, montera og avbalansera dekk á neystaloftinum hjá pápanum í Vestmanna, Fríðriki Bláhamar.

Sámal hevði ymisk sløg av dekkum, sum eisini vóru ymisk í góðsku. Alt frá kvalitetsdekkum til bílig slitbanadekk. Skorin fyri tungubandið hevur Sámal ongantíð verið – og til tess at granska í góðskuni nýtti hann hýruvognsførararnar, sum fluttu fólk millum Havnina og Vestmanna – hetta var áðrenn bussar vórðu settir inn í flogrutuna.

Hýruvognsførararnir vóru állir á einum máli um, at kvalitetsdekkini vóru tey bestu – og harvið fekk Sámal sín varhuga staðfestan – og legði hann seg eftir einans at selja bestu dekkini – og tað hevur hann gjørt síðani.

Eftir fáar mánaðir í Vestmanna, flutti Sámal virksemið til Havnar – har hann á Velbastaðvegnum saman við Svenningi Olesen læt upp væl útgjørt dekkverkstað.

Árið eftir fóru teir kortini hvør til sítt, og Sámal byrjaði við Super Dekk Service í Jekaragøtu yvir við Strond í Havn. Hetta var – uttan at taka munnin ov fullan – best útgjørda dekkverkstað í Føroyum tá.

Tey fyrstu fimtan árini umboðaði Super Dekk Service fronsku Michellin dekkini – og tað var júst um hetta mundið – seinna partin í sjeytiárunum, at kjakið um píkadekkini tók seg upp. Ikki minst var tað uppskotið hjá Dánjal Paula Danielsen, landsstýrismanni um at banna píkarnar, sum vakti miklan ans. Men eisini tað, at Sámal Bláhamar blandaði seg í kjakið og vísti á lamelldekkini, sum hann hevði at selja – at tey væl og virðiliga kundu brúkast í staðin fyri píkar. Tá var tað, at fólk í Føroyum fóru at tosa um »píkaleys píkadekk«, »heilársdekk« og seinni »lamelldekk«. Dekkini royndust sera væl, og fólkið varð tvíbýtt í trúnni upp á ávikavist píkar og ikki píkar.

Í 1979 flutti Super Dekk Service niðan á Hoyvíksvegin í bygningin, har Stoypivirkið hjá Persson hevði verið. Sámal keypti bygningin og innrættaði hann til eitt uppaftur meira tíðarhóskandi dekk- og hjólverkstað, sum framvegis legði dentin á at veita alla tænastu innan hjól og dekk – uttan at blanda alt annað bilumvælingavirksemi uppí. Umframt at veita tæanstu vil vanligar persónbilar, so var eisini koyrt út at gera aðrar dekk- og hjólumvælingar á størri vinnutólum, og hevur hetta verið týðandi partur av virkseminum hjá felagnum.

Seinast í áttatiárunum fekk felagið umboðið upp á Good Year dekkini, sum felagið hevur umboðað síðani. Í nítiárunum – tá kreppan tók kvørkratak um alt samfelagið – var eisini tungt hjá Super Dekk Service. Men teir knógvu gjøngum fyrstu kreppuárini, men máttu dvína í 1995. Tað gingu tó bert fjúrtan dagar, til teir høvdu skavað sær so mikið av kapitali saman, at virki kundi lata uppaftur, hesaferð undir heitinum Super Dekk. Hóast talan er um annað felag – tekniskt, so er talan framvegis um somu fyritøku, sum Fríðrikur Bláhamar nú stjórnaði.

# Ikki nóg tilvitað um dekknýtslu

**Stjórin á Super Dekk heldur, at føroyingar ikki enn hava nóg gott forstáilsi fyri, hvussu stóran týdning dekkini hava í sambandi við ferðslutrygdina**

DEKKFAMILJA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hóast kjakið um píkadekk nú hevur vart í fjórðingsøld, so heldur Fríðrikur Bláhamar als ikki, at vit eru komin á mál í hesum spurningi.

– Tað er heilt órímuligt, at vit framvegis ikki hava fingið størri forstáilsi yvir fyri dekknýtslu og fatan fyri, hvussu ótrúliga stóran týdning dekkini hava í ferðslutrygdini.

Tað heldur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk í Havn. Hann heldur, at vit í veruleikanum ikki eru komin serliga nógv longur, enn tá kjakið um píkarnar spíraði miðskeiðis í sjeytiárunum.

– Tá vit hugsa um, hvussu ótrúliga nógv trygdin í bilunum og á vegunum er økt hesini árini, og hvussu ótrúliga nógv meira forstáilsi vit øll hava fingið fyri ferðslutrygd, tá tað snýr seg um at koyra skjótt, sita í trygdarbelti, rúsdrekkakoyring o. s. fr., so er tað sera løgið, at vit ikki eisini duga at skilja, hvussu nógv dekkini hava at siga, heldur Fríðrikur Bláhamar, sum vísir á, at vit kunnu koyra við summardekkum – niðurslitin til markið upp á 1,6 mm – í nógvum kava og hálku – og framvegis koyra lógliga!

– Hetta átti ikki at borið til – og hetta ber ikki til í okkara grannalondum, tí har krevja myndugleikarnir, at bilarnir verða skøddir eftir umstøðunum. Tað gera vit ikki í Føroyum, sigur Fríðrikur Bláhamar.

Hann heldur, at hera vantar í sera stóran mun forstáilsi, tí tað er so upplagt, at tað átti at verið krav um størri mynsturdýpd á dekkum um veturin enn um summarið – og at serliga reglar verða gjørdar fyri nýtslu av dekkum um veturin og í hálku – ikki minst nú tosað verður um nullhugsjón!

# Umvæla steinstøkk á forrútum

**Bilverkstaðið v/Hans J. Kollsker býður seg fram at umvæla steinstøkk á forrútum**

GLASUMVÆLING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*


*Hans J. Kollsker í ferð við at umvæla eitt steinstøkk. Tólið verður fest á rútin við einum súgvikoppi. Síðani verður luftin sogin úr rivuni í rútinum, veska sprænd í, og rúturin verður heilur aftur og styrkin tann sama*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Bilverkstaðið hjá Hans J. Kollsker býður seg nú sum tað fyrsta í Føroyum fram at umvæla steinstøkk á rútum.

So ótrúligt tað enn ljóðar, so ber tað til at umvæla støkk í rútum, um rætt og nóg skjótt verður atborið.

– Tað snýr seg um at gera skjótt av, tí um ov nógv rusk og væta savnast í støkkinum, verður umvælingin truplari, sigur Hans J. Kollsker.

Í Danmark eru hesar umvælingar vanligar, og har lata tryggingarfeløgini klistrimerki, sum fólk kunnu klistra á støkkið, so skjótt tey varnast tað.

– Hetta hjálpir munandi upp á umvælingina, sigur Hans J. Kollsker.

Tá støkkið verður umvælt, verður ein serlig veska sproytað inn í sprekkuna – ella støkkið, og so verður luftin sogin úr. Rúturin verður heilur aftur og styrkin tann sama.

Á henda hátt ber til at fáa burtur sprekkur í forrútum upp til 25 cm.

Hans J. Kollsker sigur, at tey hava tosað við tryggingarfeløgini um hetta.

– Hetta kann spara tryggingini nógvar pengar, og harvið eisini tryggingartakaranum, vísir Hans J. Kollsker á. Ein slík umvæling kostar 750 kr pr støkk, meðan tað sjáldan kostar undir 4.000 kr at skifta ein forrút. Vanliga glastryggingin fevnir um skaðar upp til 4.000 kr.

Hans J. Kollsker leggur afturat, at tey sjálvandi skifta rútin, um støkkið er so mikið stórt, at tað ikki kann umvælast. Men hann vísir á, at innrivið at umvæla steinstøkk er munandi minni, enn at skifta rútin.

Men slíkar steinstøkkumvælingar verða ikki gjørdar í sýnsøkinum í rútinum, t.v.s. í einum øki á stødd við eitt A4 ark beint framman fyri føraran.

Sjálvsagt kunnu slíkar umvælingar spara nógvar pengar, og Hans J. Kollsker vísir á, at serliga tá talan er um størri bilar, so sum bussar, so hevur hendan umvælingin sera stóran týdning.

– At skifta forrútin á einum bussi kann lættliga kosta 30.000 kr, meðan ein slík umvæling kann gerast fyri 1.000 kr, tá er sjálvsagt, at talan er um sera stóra sparing, sigur hann.

# Glasumvælingin hevur áhuga hjá tryggingini

**Tryggingarfelagið Føroyar sýnir glasumvælingunum sera stóran áhuga**

GLASUMVÆLING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

At tað nú ber til at umvæla rútaskaðar er nakað, sum tryggingarfeløgini fegin taka ímóti. Hóast hetta ikki hevur borið til í Føroyum, so er tað nakað, sum tey á Tryggingarfelagnum Føroyar hava vitað um leingi.

– Vit fylgja sjálvsagt væl við í øllum slíkum, og eg havi sjálvur verið á skeiði, har vit hava sæð, hvussu rútaskaðar verða umvældir, sigur John Ellefsen, leiðari á bilsýnsdeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Hann sigur, at hetta er nakað, sum tey greiða kundunum frá, tí her eru nógvir pengar at spara. Glastryggingin dekkar hægst 4.000 krónur, og tað langt frá altíð, at ein forrútur kann skiftast fyri hendan prísin. Restina má kundin sjálvur gjalda. Øðrvísi er, um rútaskaðin er partur av einum kaskoskaða, men tá kann talan verða um bonusmiss og sjálvsábyrgd.

John Ellefsen vísir á, at Tryggingarfelagið Føroyar fyrst má vissa sær, at tað er onkur, ið kann umvæla hesar skaðar. Higartil er tað so bara verkstaðið hjá Hans J. Kollsker, ið býður seg fram, og hann hevur sæð góð úrsliti higani.

– Tað kemur so nógv nýtt fram á hesum øki. Rútaumvælingar eru eitt dømi. Annað dømi er umvælingar av eitt nú plastikkúfangarum og plastforlyktum. Meðan alt fyrr varð skift út, so eru tað tey, ið hava fingið sær serkunnleika á økinum at umvæla skaðar á slíkar lutir. Tað krevur bara, at tað er onkur, sum nemur sær serkunnleikan, og fyrr enn onkur hevur gjørt tað, kunnu tryggingarfeløgini ikki vísa til slíkar umvælingar. Men tað er greitt, at her eru pengar at spara, bæði hjá tryggingunum og tryggingartakarunum – tað er ein hugburðsbroyting sum skal til, sigur John Ellefsen.


VIT UMVÆLA STEINSSTØKK Í FORRÚTINUM



Við steinsstøkki í forrútinum verður útsýnið verri og sjálvur rúturin veikari. Sum tíðin líður kunnu eisini rivur koma í rútin.

Vit umvæla steinsløg og rivur upp til millum 15 og 20 cm í ummmáli. Verða rivurnar størri, má rúturin skiftast.

Ein nýggjur rútur er kostnaðarmikil, tí er best at fáa rútin umvældan skjótast møguligt.

BILVERKSTAÐIÐ
v/H.J. Kollsker Sp/f · Á Hjalla · Boks 3262
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 311013
Fax +298 321015 · www.kollsker.com